# UPPSKOT TIL NÝGGJA LØGTINGSLÓG UM FUGLAVEIÐI

Óla Jákup Hentze, Marni av Kák og Bergur Olsen.

**Innihald:**

Formæli
Lógaruppskot
Kort yvir fuglabjørg
Viðmerkingar
Ummæli

1 9 OKT. 1987 64
F. L. j. nr. 610-9-2

610-9-2 79

FORMÆLI

Í skrivi dagfest 21. apríl 1986 setti Føroya Landsstýri undirritaðu nevnd at endurskoða fuglaveiðulógina, og nevndin er nú komin ásamt um eitt lógaruppskot aftan á at eitt fyribils uppskot hevur verið til ummælis hjá ymiskum stovnum, feløgum og staklingum, sum vit mettu høvdu serligan áhuga í hesum máli. ~~Ummælini eru hjáløgd.~~

Fyrsta lógin á hesum øki er frá 9. februar 1854, og var hon rópt "Jagtlov for Færøerne". Undan hesi lóg kenna vit ávísar friðlýsingar av fuglabjørgum v.m., ið teir, sum ognarrætt høvdu, fingu sett í verk. Friðlýsingarnar blivu vanliga lýstar á vártingi og tær kundi t.d. vera ein friðing ímóti ávísum veiðiháttum ella ein avmarking av rættinum til veiðu á ávísum støðum.

Í 1700-talinum fór nýtslan av byrsu at vinda upp á seg, og hetta eru nevndu friðlýsingar eisini merktar av. Klagurnar um, at skjótingin undir fuglabjørgum og aðrastaðni órógvaði fuglin og stygdi hann, førdu við sær, at fyrsta lógin um fuglaveiðu kom í gildi 1854. Lógin heimilaði friðlýsingar, sum í rættiliga stórum tali blivu tinglýstar, og enn tann dag í dag verða hesar gomlu friðlýsingar lisnar upp á grannastevnum.

1854-lógin fekk broytingar og uppískoyti í 1871, 1881, 1887 og 1891, til vit fingu eina nýggja veiðilóg í 1897. Ein endurskoðan afturat førdi við sær "Lov for Færøerne om jagt og fuglefangst" í 1928. Aftur í 1954 fingu vit eina endurskoðaða fuglaveiðilóg, sum síðani er broytt í 1972, 1974, 1984, 1986 og 1987.

Fuglur, serliga lomvigi og lundi, hevur verið ein týðandi partur av tí dagliga kostinum, men lomvigatalið er minkað ógvuliga nógv seinastu 25 árini. Havhesturin er harafturímóti nørdur nógv, og er nú okkara týdnigarmiklasti fuglastovnur, sum vit veiða á ein fyrimyndarligan hátt.

Veiða í bjørgum er í stóran mun dottin niður fyri og verður at kalla sum ein leivd av okkara gomlu mentan, ið eigur at verða varðveitt sum best, og í øðrum lagi ber ferðil av ítrótti í sær.

Veiða við byrsu hevur framvegis stóran áhuga, men hetta er ein vandamikil veiðiháttur, sum má stýrast, tí teir sum veiða fugl á sjónum hava lítlan møguleika at fylgja við, hvussu stovnurin broytist og tí eisini hvussu nógva veiðu hann tolir.

Kjakið um broytingar í veiðilógini seinastu 15 árini hevur serliga verið um hvørt lomvigin skuldi friðast ella ikki, men prógv eru nú fingin fyri, at stovnurin ikki tolir veiðu á sumri.

Í okkara grannalondum verður dentur lagdur á at veiða tey fuglasløg, sum verpa fleiri egg um árið og soleiðis kunnu nørast skjótt. Hetta er í nógvum førum antarfuglar, heiðafuglar og høsnafuglar, sum vit ikki hava møguleika at veiða.

Um vit skulu veiða fugl, so hava vit bert sjófuglin at taka av, og sjálvt um stovnarnir eru stórir, so mugu vit vera ógvuliga varnir, tí okkara týdningarmiklastu fuglar fáa í mesta lagi ein unga upp á parið á hvørjum ári, og bert ein lítil partur av hesum ungum eru á lívi, tá teir fleiri ára gamlir verða kynsbúnir.

Tann fuglir, sum verður veiddur, má tí røkjast á skynsamasta hátt, har búfuglurin fær so góðan frið sum gjørligt, meðan dentur verður lagdur á at veiða tann unga fuglin.

Náttúran hevur stórt rekreativt virði og fyri at varðveita fuglastovnin so náttúrligan sum gjørligt, halda vit, at teir stovnar, ið ikki verða veiddir til matna, skulu hava frið, sjálvt um t.d. smyril, ravnur, kráka og másasløgini taka ein part av teirra føði av øðrum fuglastovnum. Hetta er heilt náttúrligt, og nú flakavirkini eru farin at nýta slógvið til djórafóður, og ruskplássini minka í tali, fer másastovnurin av sær sjálvum at koma niður á eitt meira náttúrligt støði.

Við hesum í huga hava vit gjørt eitt nýtt lógaruppskot, har reglurnar samstundis eru gjørdar einfaldari, so t.d. tær núgaldandi friðlýsingarnar ikki eru neyðugar, og skotið er upp, at Føroya Náttúrugripasavn fær heimild at umsita lógina - harundir at gera undantøk í ávísum førum.

Tórshavn, hin 19. oktober 1987

Óla J. Hentze — Marni av Kák — Bergur Olsen

*Óla J. Hentze* — *M. av Kák* — *Bergur Olsen*

Bergur Olsen
Óla Jákup Hentze
Marnar av Kák, sýslumaður, Sørvági.

W: LM87
H: FUGLUR

U p p s k o t

til

løgtingslóg um friðing og veiði av villini fugli.

Kapittul 1.
Verja av villini fugli.

§ 1. Allur fuglur, ið ikki er nevndur í § 13 er friðaður allastaðni út at fiskimarkinum.
Stk. 2. Friðingin umfatar eisini egg, pisur (ungar) og reiður.

§ 2. Tað er bannað at flyta inn og út av landinum allan livandi fugl. Hetta forboðið umfatar eisini egg og pisur (ungar).
Stk. 2. Føroya Náttúrugripasavn kann í serligum førum og við vísindaligum endamáli gera undantak frá stk. 1.

§ 3. Tað er forboðið at órógva fuglin við óneyðugum óljóði frá skipum, bát-

lagtingslov om fredning og fangst/jagt af vildfugle.

Kapitel 1.
Beskyttelse af vildfugle.

§ 1. Alle fugle, som ikke er angivet i § 13, er fredede overalt ud til fiskerigrænsen.
Stk. 2. Fredningen omfatter tillige æg, unger og reder.

§ 2. Det er forbudt at importere og eksportere alle slags levende fugle. Forbudet omfatter tillige æg og unger.
Stk. 2. Færøernes Naturmusæum kan i særlige tilfælde og med videnskabeligt formål give dispensation fra stk. 1.

§ 3. Det er forbudt at forstyrre fuglenes fred ved unødvendig larm fra skibe,

um, skjóting, skipsfloytum, flogførum/ tyrlum ella øðrum gangi.

Stk. 2. Tað er forboðið at órógva og at avmynda (fotografera-filma-taka upp á video) sjáldsom fuglasløg nærhendis og á reiðrum teirra, t.d. lóm, smyril og vípu.

Stk. 3. Ferðamannafeløg, stovnar og onnur, ið skipa fyri ferðum til fuglalendi, hava skyldu at kunna tey ferðandi um frammanfyri standandi reglur.

både, skibssirener, skydning, flyvemaskiner/ helikoptere eller anden støj.

Stk. 2. Det er forbudt at forstyrre og at fotografere eller tage på film og video sjældne fuglearter i nærheden af og på deres reder, f.eks. lom, dværgfalk og vibe.

Stk. 3. Turistforeninger, institutioner og andre, som arrangerer ture til fugleområder, har pligt til at gøre de rejsende bekendt med foranstående bestemmelser.

§ 4. Fuglakanningar og -eygleiðingar skulu fráboðast Føroya Náttúrugripasavni.

Stk. 2. Kanningar, sum órógva fuglin, harundir ringmerkingar, kunnu bert fara fram eftir loyvi frá Føroya Náttúrugripasavni og eftir ummæli frá viðkomandi eigara (hagastýri).

§ 4. Fugleundersøgelser og -iagttagelser skal meddeles Føroya Náttúrugripasavn.

Stk. 2. Undersøgelser, der forstyrrer fuglene, herunder ringmærkning, kan kun foretages med tilladelse fra Færøernes Naturmusæum efter indhentet udtalelse fra vedkommende ejer (haugebestyrelse).

§ 5. Føroya Náttúrugripasavn kann skipa fyri týning av fugli, sum er til ampa á ávísum økjum, sum t.d. alibrúk og floghavn.

Stk. 2. Um ein fuglastovnur er til ampa fyri aðrar

§ 5. Færøernes Naturmusæum kan forestå udryddelse af fugle, som er til ulempe i særlige områder, f.eks. fiskeopdræt og lufthavn.

Stk. 2. Hvis en fuglebestand er til ulempe for

stovnar, kann Føroya Náttúrugripasavn skipa fyri, at minkað verður um stovnin um alt landið ella partar av landinum.

Stk. 3. Um ein fuglastovnur er hóttur av skaðadýrum, t.d. rottum og kettum (útløgukattum), kann Føroya Náttúrugripasavn skipa fyri týning.

Stk. 4. Áðrenn Føroya Náttúrugripasavn ger tiltøk eftir stk. 1-3 skulu viðkomandi bygdaráð/býráð fáa høvi til at geva sítt ummæli.

andre fuglebestande, kan Færøernes Naturmusæum forestå en udtyndning af bestanden over hele landet eller dele af landet.

Stk. 3. Såfremt der er fare for, at en fugleart udryddes af skadedyr, f.eks. rotter og katte (vildkatte), kan Færøernes Naturmusæum forestå skadedyrsbekæmpelsen.

Stk. 4. Forinden Færøernes Naturmusæum griber ind efter stk. 1-3, skal der gives vedkommende bygderåd/byråd lejlighed til at udtale sig.

## Kapittul 2.
## Um veiðurættindi

§ 6. Uppi á landi eigur grundeigarin veiðurættin. Viðvíkjandi veiðurætti er hann, sum situr við kongs- ella aðrari almennari jørð javnbjóðis grundeigara.

Stk. 2. Har ikki serlig rættarviðurskifti gera avvik, hava eigararnir í tí gamla, matrikuleraða bønum í tí bygd, har bjørgini liggja, fuglaveiðurættin í bjørgum, urðum og tílíkum fuglalendi.

Stk. 3. Har felag er, og

## Kapitel 2.
## Om fangst/jagtrettigheder

§ 6. Fangstretten til lands tilkommer grundejeren. Ligestillet med grundejeren betragtes med hensyn til fangstret besiddere af kongs- eller anden offentlig jord.

Stk. 2. Hvor ikke særlige retsforhold medfører afvigelse, tilkommer retten til fuglefangst i fuglebjerge, urer og lignende steder ejerne af den gamle matrikulerede indmark i den bygd, hvortil fuglepladsen

samtykt ella fyrndarrættur ger ikki avvik, hava eigararnir javnbjóðis veiðurætt.

Stk. 4. Samtykt um nýtslu av veiðurætti í felag kann gerast á grannastevnu. Í tílíkari samtykt kann fyrisetast, at veiða bert kann fara fram í minni mun ella yvirhøvur ikki.

Stk. 5. Einsæris burturlating av veiðurættindi kann bert fara fram fyri upp til 5 ár í senn.

§ 7. Har ikki serlig rættarviðurskifti gera avvik, hava eigararnir (hagastýrini) heimild til at áseta samsýning fyri veiðurættindi.

Stk. 2. Slíkar inntøkur verða býttar millum hagarnar eftir markatalinum.

§ 8. Á sjónum út at fiskimarkinum er veiðurætturin við teimum avvikum, sum tilskilað eru í hesi lóg, opnin fyri einum og hvørjum, sum hevur heimarætt.

hører.

Stk. 3. På fællig, hvor ikke vedtægt eller sædvane medfører afvigelse, har enhver ejer lige fangstret.

Stk. 4. Vedtægt om udnyttelse af fangstret på fællig kan oprettes ved grandestævne. I en sådan vedtægt kan fastsættes, at fangsten kun sker i mindre omfang, eller at der slet ikke foretages nogen fangst.

Stk. 5. Særskilt overdragelse af fangstret kan ske for indtil 5 år ad gangen.

§ 7. Hvor ikke særlige retsforhold gør sig gældende, har ejerne (haugebestyrelserne) ret til at fastsætte betaling for fangstret.

Stk. 2. Sådanne indtægter fordeles mellem haugerne efter marketallet.

§ 8. Fangst/jagtretten til søs ud til fiskerigrænsen er med de i denne lov fastsatte undtagelser fri for enhver, som har færøsk/dansk indfødsret.

Kapittul 3.

Um veiðutreytir.

§ 9. Tað er bert loyvt at veiða fugl til fólkaføði.

Stk. 2. Veiða má bert fara fram gerandisdagar.

Stk. 3. Føroya Landsstýri ásetir við kunngerð reglur um hagtøl yvir veiðuúrslit.

§ 10. Til fuglaveiðu má byrsa bert nýtast í báti.

Stk. 2. Til fuglaveiðu er bert loyvt at brúka høglbyrsu við hægst 2 skotum og størst kalibur 12.

§ 11. Til at veiða fugl við byrsu krevst serligt skjótiloyvi.

Stk. 2. Føroya landsstýri ásetir í kunngerð reglur og gjald fyri skjótiloyvi.

§ 12. Ongastaðni er loyvt at skjóta nærri landi enn 200 metrar.

Stk. 2. Við bygd øki má eingin skjóta nærri enn 500 metrar.

Kapittel 3.

Om fangst/jagtrettigheder.

§ 9. Det er alene tilladt at fange/nedlægge fugle til menneskeføde.

Stk. 2. Fuglefangst og -jagt er alene tilladt på hverdage.

Stk. 3. Færøernes Landsstyre fastsætter ved bekendtgørelse regler for statistik over fangst- og jagtresultater.

§ 10. Til fuglejagt må skydevåben alene benyttes fra båd.

Stk. 2. Til fuglejagt er det alene tilladt at benytte haglgevær med højst 2 skud og størst kaliber 12.

§ 11. Til fuglejagt med haglgevær kræves særlig skydetilladelse.

Stk. 2. Færøernes Landsstyre fastsætter ved bekendtgørelse regler og betaling for skydetilladelse.

§ 12. Det er ingen steder tilladt at skyde nærmere land end 200 meter.

Stk. 2. Ved bebygget område må ingen skyde nærmere end 500 meter.

Stk. 3. Undir lomvigabjørgum (smbr. viðhefta kort) má eingin skjóta nærri enn 4 km frá 1. februar til og við 31. august.

Stk. 4. Undir ritubjørgum, lundaurðum/-londum, skarvaurðum og við æðuvørp má eingin skjóta í sama tíðarskeiði nærri enn 500 metrar frá 1. februar til og við 31. august.

Stk. 5. Undir súlubjørgum (sí viðhefta kort) má eingin skjóta nærri enn 4 km frá 1. februar til og við 31. oktober.

Stk. 3. Under fuglebjerge, hvor lomvier yngler (jfr. vedlagte kort) må ingen skyde nærmere end 4 km fra 1. februar til og med 31. august.

Stk. 4. Under fuglebjerge, hvor rider yngler, lundeurer og -lande, skarveur og ved rugepladser for edderfugle må ingen skyde nærmere end 500 meter fra 1. februar til og med 31. august.

Stk. 5. Under fuglebjerg, hvor suler yngler (se vedlagte kort), må ingen skyde nærmere end 4 km fra 1. februar til og med 31. oktober.

§ 13. Undir frammanfyri nevndu treytum er tað loyvt at veiða hesi fuglasløg og taka ungar/pisur og egg teirra soleiðis:

Havhestur/náti: Havhestur kann fleygast alt árið og skjótast frá 1. september til og við 30. apríl. Loyvt er eisini at ræna og taka ungar.

Skrápur: Líri kann takast við ljósi frá 26. august til og við 5. september á ávísum plássum eftir loyvi frá Føroya Náttúrugripasavni.

§ 13. På foran anførte betingelser er det tilladt at fange/skyde følgende fuglearter og tage fugleunger og -æg således:

Malemukken: Malemukken kan flejes hele året og kan skydes i tiden fra 1. september til og med 30. april. Det er også tilladt at tage dens æg og unger.

Skråpen: Skråpeunger kan tages med lys i tiden fra 26. august til og med 5. september på visse steder efter tilladelse fra Færøernes Naturmusæum.

Sũla: Grãsũla kann takast ã ãvĩsum rókum ĩ Mykinesihólmi eftir loyvi frã Føroya Nãttũrugripasavni.

Skarvur: Skarvsungi kann takast ã reiðri ã ãvĩsum plãssum eftir loyvi frã Føroya Nãttũrugripasavni og skjótast frã 1. september til og við 31. oktober.

Likka: Likkuskuri kann skjótast frã 1. september til og við 30. aprĩl. Loyvt er eisini at ræna og taka ungar.

Fiskimãsi: Mãsaskuri kann skjótast frã 1. september til og við 30. aprĩl. Loyvt er eisini at taka egg og ungar.

Bakur: Bakaskurði kann skjótast frã 1. september til við 30. aprĩl. Loyvt er eisini at ræna og taka ungar.

Rita: Rita kann fleygast alt ãrið og skjótast frã 1. september til og við 30. aprĩl. Loyvt er eisini at taka egg og ungar.

Lomvigi: Lomvigi kann skjótast frã 1. september til og við 14. mars. Loyvt er at ræna til og við 8. juni ĩ ãvĩsum bjørgum eftir loyvi frã Føroya Nãttũrugripasavni.

Lundi: Lundi kann fleygast

Sulen: Gråsulen kan tages på visse fjeldhylder i Mykines Holm efter tilladelse fra Færøernes Naturmusæum.

Skarven: Skarveungen kan tages på reden på visse steder efter tilladelse fra Færøernes Naturmusæum; og kan skydes i tiden fra 1. september til og med 31. oktober.

Sildemågen: Sildemågeungen kan skydes i tiden fra 1. september til og med 30. april. Det er også tilladt at tage dens æg og unger.

Sølvmåge: Sølvmågens unge kan skydes i tiden fra 1. september til og med 30. april. Det er også tilladt at tage dens æg og unger.

Svartbag: Svartbagens unge kan skydes i tiden fra 1. september til og med 30. april. Det er også tilladt at tage dens æg og unger.

Riden: Riden kan flejes hele året og skydes i tiden fra 1. september til og med 30. april. Det er også tilladt at tage dens æg og unger.

Lomvien: Lomvien kan skydes i tiden fra 1. september til og med 14. marts. Det er tilladt at tage dens æg i tiden til og med 8. juni

frá 24. juni til og við 31. august og skjótast frá 1. september til og við 14. mars. Drátttur kann, undir serligum umstøðum fara fram eftir loyvi frá Føroya Náttúrugripasavni, tó bert 3. hvørt ár í sama fuglalendi.

i visse fuglebjerge efter tilladelse fra Færøernes Naturmusæum.
Lunde: Lunden kan flejes i tiden fra 24. juni til og med 31. august, og skydes i tiden fra 1. september til og med 14. marts. Trækning kan under særlige omstændigheder ske efter tilladelse fra Færøernes Naturmusæum, dog kun hvert 3. år i samme lundeland.

§ 14. Føroya Náttúrugripasavn hevur heimild til í vísindaligum endamáli at geva undantaksloyvi frá §§ 10 til og við 13.

§ 14. Færøernes Naturmusæum har bemyndigelse til i videnskabelige øjemed at give dispensation fra §§ 10 til og med 13.

Kapittul 4.
Eftirlit, revsing og nær lógin kemur í gildi.

§ 15. Vaktar- og Bjargingartænastan hevur á sjónum eftirlit við, at lógin verður hildin og hevur rætt til uttan rættarúrskurð at fara umborð á bátar at gera neyðugar kanningar.

Kapitel 4.
Tilsyn, straf og ikrafttræden.

§ 15. Vagt- og Bjærgningstjenesten fører på søen tilsyn med, at loven overholdes og har ret til uden retskendelse at gå ombord i både for at foretage fornødne undersøgelser.

§ 16. Uttan so at harðari revsing er uppiborin eftir lóggávuni annars, kemur hann undir bót, hefti ella fongsul upp í 2 ár, sum brýtur reglurnar í § 2, stk. 1, §§ 3-4, § 9, stk.

§ 16. Medmindre højere straf er forskyldt efter den øvrige lovgivning straffes med bøde, hæfte eller fængsel indtil 2 år den, der overtræder bestemmelserne i § 2, stk. 1, §§

1-2, § 10, § 11, stk. 1, og §§ 12-13.
Stk. 2. Í reglum, ið verða givnar við heimild í hesi lóg, kann verða ásett sekt fyri brot á reglurnar.
Stk. 3. Er brotið framt av partafelag, lutafelag ella tílíkum, kann bót verða áløgd felagnum í sjálvum sær.
Stk. 4. Skjótiloyvið kann verða tikið aftur, um loyvishavarin verður dømdur fyri brot á lógina ella reglur givnar við heimild í lógini.

3-4, § 9, stk. 1-2, § 10, § 11, stk. 1 og §§ 12-13.
Stk. 2. I forskrifter, der udstedes i medfør af denne lov, kan fastsættes straf af bøde for overtrædelse af forskrifterne.
Stk. 3. Er overtrædelsen begået af et aktieselskab, andelsselskab eller lignende, kan bødeansvar pålægges selskabet som sådant.
Stk. 4. Skydetilladelsen kan inddrages, hvis indehaveren dømmes for overtrædelse af denne lov eller forskrifter udstedt i medfør af denne lov.

§ 17. Málini fara fram sum løgreglumál. Tey í rættargangslógini kap. 68 (at leggja hald á), kap. 71 (handtøka) og kap. 72 (fongsling) nevndu tiltøk koma tó eisini í nýtslu í sama mun sum í máoum, sum statsákærin søkir at.

§ 17. Sagerne behandles som politisager. De i retsplejelovens kap. 68 (konfiskation), kap. 71 (anholdelse) og kap. 72 (fængsling) nævnte foranstaltninger tages ofså i anvendelse i lighed med statsadvokatsager.

§ 18. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
Stk. 2. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu v.m., sum hon er broytt við løgtingslógunum

§ 18. Denne lov træder i kraft dagen efter at den er bekendtgjort.
Stk. 2. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 27 af 9. september 1954 om fuglefangst m.v., som den er ændret ved lagtingslovene

nr. 33 frå 7. juni 1972, nr. 44 frå 24. mai 1974, nr. 60 frå 5. juni 1984, nr. 33 frå 16. april 1986 og nr. 81 frå 14. august 1987.

nr. 33 af 7. juni 1972, nr. 44 af 24. maj 1974, nr. 60 af 5. juni 1984, nr. 33 af 16. april 1986 og nr. 81 af 14. august 1987.

Lunda lond.






*15 The main Puffin colonies in the Faeroe Islands (E. Mortensen). Smaller numbers nest on the marked coasts.*

# SŮLUBJØRG 1987



LOMVIGABJØRG 1987



RITUBJØRG 1987



Viðmerkingar til løgtingslóg um friðing og veiðu av villini fugli

Yvirskriftin: Í núgaldandi lóg er haran tikin við, men vit skjóta upp, at komandi lóg bert skal umfata fugl, og her verður bert hugsað um villan fugl.

Mest umráðandi er, at lógin virkar sum vernd av fuglinum, og tí hava vit tikið friðingina fyrst í yvirskriftini.

§ 2, stk.1: Við hesi reglu verður í fyrsta lagi hugsað um, at sjúkur fuglur ikki verður fluttur inn og í øðrum lagi at varðveita fuglastovnin, sum hann er fra náttúruni av. Tað skal ikki vera loyvt, uttan serligt loyvi, at flyta inn fugl, t.d. havørn og hipling, við útseting fyri eyga og soleiðis broyta tað náttúrliga fuglalívið.

§ 3, stk.2: Henda reglan er sett sum ein eyka vernd fyri fuglasløg, sum eru fáment, og tí heilt kunnu hvørva, um tey ikki fáa frið at reiðrast.

§ 4, stk.1: Allar fuglakanningar skulu skrásetast, so almenningurin veit hvørjar kanningar fara fram, og Føroya Náttúrugripasavn skal hava høvi at samskipa kanningar, ið órógva fuglin, so fuglurin verður órógvaður minst møguligt.

§ 5, stk.2: Her verður hugsað um kráku, ravn, skúgv og másasløgini, sum í gomlu lógini vórðu loyvd at veiða fyri at minka um stovnarnar. Burtursæð frá skúgvastovninum, sum tíverri er avoyddur í støðum, hevur hetta veiðiloyvi ikki havt nakra ávirkan á stovnsstøddirnar. Stovnarnir eru ikki størri enn so, at ein stýring kann fremjast. T.d. verður mett, at bert eini 250 skúgvapør, eini 150-350 ravnapør og 500 krákupør eiga her. Másasløgini eiga í stórum bølum, sum eru væl kend, og her kann tí lættliga verða minkað um talið.

§ 9, stk.3: Tað hevur stóran týdning fyri eftirlitið av stovnsbroytingum og veiðitrýstinum, at veiðimenn eina ferð á hvørjum ári boða frá veiðinøgdini. Hetta er samsvarandi reglurnar frá 1986 um treytirnar fyri ræning av lomvigareggum.

§ 10, stk.1: Saman við § 12 gevur henda reglan fuglinum frið alla staðni á landi og minst 200m út á sjógv. Harafturat verjur hon ímóti, at fuglur verður skotin frá landi og dettur niður á sjógv, kanska lamskotin, har møguleiki ikki er fyri at fáa hendur á honum.

§ 11, stk.1: Hugsanin um skjótiloyvi var eisini frammi í 1928, tá veiðilógin var til viðgerðar í løgtinginum, men uppskotið kom ikki við. Í Danmark og Noreg hevur skjótiloyvi verið kravt í nógv ár.

§ 11, stk.2: Aðrastaðni skulu fólk standa eina lætta roynd fyri at fáa skjótiloyvi. Tey, ið hava byrsu, áðrenn kunngerðin um skjótiloyvi verður sett í gildi, eiga at fáa skjótiloyvi uttan roynd, um tey boða frá innan ávísa tíðarfreist. Vanliga verður eitt lítið gjald latið fyri skjótiloyvið á hvørjum ári, sum m.a. umfatar eina ábyrgdartrygging. Harafturat tryggjar royndin, at teir, sum skjóta fugl, duga at handfara eina byrsu og kenna fuglarnar.

Fyri at fáa so álítandi veiðihagtøl sum gjørligt, skal ein ikki kunna keypa lóður uttan skjótiloyvi, og tað skal ikki kunna endurnýggjast fyrr enn veiðitølini eru latin inn.

§ 12: Tær her uppsettu reglur avloysa tær friðlýsingar av fuglabjørgurm, urðum, æðuvørpum o.t., sum vit hava havt heimild til í teim gomlu veiðulógunum. Hesar friðlýsingar umfataðu meginpartin av landinum, men kortini eru fuglapláss, t.d. Tindhólmur og Koltur, ið ikki eru friðlýst. Sum § 12 nú er stílað, eru hesi pláss eisini vard.

Frástøðan, ein skal vera frá bygdum øki og fuglabjørgum, tá skotið verður, er tann sama, um ein er beint út fyri ella um ein er við síðuna av, soleiðis at ein t.d ongantíð loysir skot av nærri enn 4 km frá eini lomvigarók. Í núgaldandi lóg nýtist ein bert at vera hálvfjórðing frá, um ein kemur fram við landi.

§ 13: Við hesi grein verður roynt at skipa veiðuna á skynsamasta hátt, soleiðis at mest fæst burtur úr teimum stovnunum, sum tola veiðu, meðan restin fær frið. Tað skaðar stovnin minst, at ungur fuglur verður veiddur fram um búfuglin.

Orsøkin, til at ein skal hava loyvi frá Føroya Náttúrugripasavni til at veiða av ymsum fuglastovnum, er, at summi pláss eru so smá, at tey ikki tola veiðu. Harafturat er tað lættari at hava eftirlit við hagtølunum, tá ein veit, hvør hevur verið á veiðu, tí øll veiða skal skrásetast, ikki bert tann sum fæst við byrsu.

Grundarlagið, fyri hvørjir fuglar kunnu veiðast, er støddin á stovnunum, men harafturat er hugsað um, at tey fuglasløg, sum verpa fleiri egg (másasløgini og skarvurin), tola lutvís størri veiðu enn tey, sum bert verpa eitt (havhesturin, skrápurin, súlan, lomvigin, álkan og lundin). Tá stovnar eru í minking, sum t.d. lomviga- og álkustovnurin, má ein vera sera varin við veiðu.

<u>Havhestur:</u> Fleiri 100.000 pør. Sjálvt um veiðan er stór, nørist stovnuurin framvegis.
<u>Skrápur:</u> 10.000 - 15.000 pør. Í summum plássum eiga bert nøkur fá pør, og hesi eiga at fáa frið.
<u>Súla:</u> 2000 pør. Súlan er nørd nógv um okkara leiðir, men á Mykineshólmi og á Mykinesi er bert ein lítil vøkstur. Hetta er tann stovnurin, sum hevur havt størsta veiðitrýst, tí størsti parturin av ungunum hevur verið tikin. Um veiðitrýstið ikki hevði verið so stórt, kundi tað hent, at súlan hevði tikið eitt nýtt berg.
<u>Skarvur:</u> Nøkur 1000 pør. Av tí at ein skal vera minst 200m frá landi, eru møguleikarnir fyri at veiða skarv minkaðir munandi, og tí kundi tíðin verðið longd ein mánað, so loyvt varð at skjóta frá 1. september til og við 30. november.

Másasløgini: Lítið verður vanliga skotið av másasløgunum, og tí loyva vit veiðu av teimum stovnum, sum eru o.u. 1000 pør og størri. Likka 9.000 pør, fiskimási 1.200 - 1.500 pør, bakur 900 - 1000 pør og rita 230.000 pør.

Lomvigi: 175.000 pør. Lomvigastovnurin er minkaður o.u. 70%-90% seinastu 30 árini, og teljingar í summar vístu, at stovnurin nú er komin niður á o.u. 175.000 pør. Veiða hevur ikki alla skuldina, men friðingin á sumri tykist at hava hjálpt upp á støðuna, so minkingin ikki er so stór sum árini frammanundan.

Ringmerkingar fra 1970-árunum vísa, at tað, sum verður skotið um veturin, mest er ungur fuglur, meðan búfuglurin bleiv skotin frá fyrst í apríl.

Áðrenn lomvigin bleiv friðaður, varð mest skotið um summarið, men nú hann hevur verið friðaður á sumri, er rættiliga nógv blivið skotið í februar og mars. Vit hava tí skotið upp at leingja friðingina ein hálvan mánað, so loyvt er at skjóta til og við 14. mars, men best hevði verið, um lomvigin varð friðaður allan mars mánað.

Álka: 5.000 pør. Álkan hevur higartil verið veidd í sama tíðarskeiði sum lomvigin, men av tí at stovnurin er so lítil, mæla vit frá at veiða álku.

Fyrr var álka tann svartfuglur, sum nógv mest bleiv skotið av um veturin, men hon er minkað nógv í tali, og er nú bert ein lítil partur av vetrarveiðini. Um tað bert er føroysk álka, sum er undir Føroyum á vetri, so hevur stovnurin verið troyttur alt ov nógv.

Lundni: Fleiri 100.000 pør. Ongar stórvegis broytingar hava verið í stovninum seinastu árini.

§ 15: Um Vaktar og Bjargingartænastan hevur eftirlit við fuglaveiðini á sjónum, vóna vit, at lógin verður hildin munandi betur.

NEVNDIN TIL ENDURSKOÐAN
AV FUGLAVEIÐULÓGINI
Marni av Kák, sýslumaður
FR 380 Sørvági

Hin 28. juli 1987.

Fylgjandi skriv er saman við lógaruppskotinum sent til niðanfyri standandi:

Í skrivi dagfest 21. apríl 1986 setti Føroya Landsstýri nevnd at endurskoða fuglaveiðulógina v.m. - Í nevndini sita Óla Jákup Hentze, Skúvoy, Bergur Olsen, Vestmanna, og Marni av Kák.

Nevndin hevur fingið álagt at lata álit til Landsstýrið 1. september 1987.

Á fundum hevur nevndin gjørt eitt uppskot til "Løgtingslóg um friðing og veiðu av villini fugli v.m."

Vit í nevndini eru samdir um at biðja tygum um eitt ummæli til lógaruppskotið, áðrenn tað verður sent Landsstýrinum.

Um tað er gjørligt, vildu vit ynskt, at møguligar viðmerkingar frá tygum eru nevndini í hendi í seinasta lagið 20. august 1987.

./. Hjálagt er eitt eintak av uppskotinum.

Vinarlig heilsan,
n.v.

M. av Kák.

28 JULI 87 M

Sent tann:
1. Fiskirannsóknarstovan, att. Andreas Reinert, Tórshavn
2. Føroya Natúrgripasavn, Tórshavn
3. Føroya Fuglafrøðifelag, Bergur Olsen, Vestmanna
4. Føroya Natúr- og Umhvørvisfelag, Tórshavn
5. Arne Nørrevang, Tórsbyrgi 13, Tórshavn
6. Hjartvard Skálagarð, politim., Sóljuvegur 12, Tórshavn
7. Føroya Jarðarráð, Tórshavn
8. Føroya Bóndafelag, Tórshavn
9. Óðalsfelag, Zakarias Wang, Hornavegur 16, Tórshavn

NEVNDIN TIL ENDURSKOÐAN
AV FUGLAVEIÐULÓGINI
Marni av Kák, sýslumaður
FR 380 Sørvági

Hin 28. juli 1987.

Fylgjandi skriv er saman við lógaruppskotinum sent til niðanfyri standandi:

Í skrivi dagfest 21. apríl 1986 setti Føroya Landsstýri nevnd at endurskoða fuglaveiðulógina v.m. - Í nevndini sita Óla Jákup Hentze, Skúvoy, Bergur Olsen, Vestmanna, og Marni av Kák.

Nevndin hevur fingið álagt at lata álit til Landsstýrið 1. september 1987.

Á fundum hevur nevndin gjørt eitt uppskot til "Løgtingslóg um friðing og veiðu av villini fugli v.m."

Vit í nevndini eru samdir um at biðja tygum um eitt ummæli til lógaruppskotið, áðrenn tað verður sent Landsstýrinum.

Um tað er gjørligt, vildu vit ynskt, at møguligar viðmerkingar frá tygum eru nevndini í hendi í seinasta lagið 20. august 1987.

⁒ Hjálagt er eitt eintak av uppskotinum.

Vinarlig heilsan,
n.v.

M. av Kák.

28 JULI 87 M

Sent tann:
1. Fiskirannsóknarstovan, att. Andreas Reinert, Tórshavn
2. Føroya Natúrgripasavn, Tórshavn
3. Føroya Fuglafrøðifelag, Bergur Olsen, Vestmanna
4. Føroya Natúr- og Umhvørvisfelag, Tórshavn
5. Arne Nørrevang, Tórsbyrgi 13, Tórshavn
6. Hjartvard Skálagarð, politim., Sóljuvegur 12, Tórshavn
7. Føroya Jarðarráð, Tórshavn
8. Føroya Bóndafelag, Tórshavn
9. Óðalsfelag, Zakarias Wang, Hornavegur 16, Tórshavn

**Føroya Náttúrugripasavn**
Debesartrøð
100 Tórshavn - Tlf. 12306

Tórshavn 11.8.87

Nevndin til endurskoðan
av fuglaveiðilógini
v/Marner av Kák
380 Sørvágur

Takk fyri møguleikan at gera viðmerkingar til ta nýggju fuglaveiðilógina. Hjálagdar eru viðmerkingar skrivaðar áraka tær greinar, sum viðgjørdar verða. Saknur er í greinunum 19-20 í tí gomlu lógini, sum fevna um haru-veiðuna. Serliga, tá ið tað nýggja veiðilógaruppskoti eitur "veiða av villini fugli v.m."

Harumframt er bert gleðiligt, at hin nýggja veiðilógin fer at fáa í lag veiðitekin.

Vinarliga,

Dorete Bloch

Hetta pappírið er endurnýtt

FØROYA LANDSSTÝRI

3800 Tórshavn, 8 . februar 1987.

Tlf. 1 1080 . Telex 81235 tingns fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10-15, leygardag stongt

F. L. j. nr. 8
(at tilskila í svari)

U P P S K O T

SR/EB

| |
|---|
| W: LM86 |
| H: FUGLUR |
| Góðkent |
| Landsst.fund |
| Góðk. til framløgu |

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 8 /1986: Løgtingslóg um friðing og veiðu av villini fugli v.m.

U p p s k o t

til

30 JUNI 87 M

løgtingslóg um friðing og veiðu av villini fugli v.m.

1. kapittul.
Verja av villini fugli.

§ 1. Allur fuglur, ið ikki er nevndur í § 14 er friðaður allastaðni út at tí fiskimarkinum.
Stk. 2. Friðingin umfatar eisini egg, pisur (ungar) og reiður.

§ 2. Tað er forboðið at flyta inn og út av landinum allan livandi og deyðan fugl. Hetta forboðið umfatar eisini egg, pisur (ungar), reiður og lutir av fugli (t.d. eggjakoppar og

ham (skinn).
Stk. 2. Føroya Náattúrugripasavn kann í serligum førum og við vísindaligum endamáli gera undantak frá stk. 1.

§ 3. Tað er forboðið at órógva fuglin við óneyðugum óljóði frá skipum, bátum, skjóting, skipsfloytum, flogførum/ tyrlum ella øðrum gangi.

Stk. 2. Tað er forboðið ørindaleysum at órógva fuglin, har hann heldur til ella reiðrast.

ad.stk.2: Sílafiskarar og tjald-ferðafólk munnu hava ørindi, men kunnu kortini órógva heiðafuglin.

Stk. 3. Tað er forboðið at avmynda (fotografera-filma-taka upp á video) sjáldsom fuglasløg nærhendis og á reiðrum teirra, t.d. lóm, smyril og vípu.

Stk. 4. Ferðamannafeløg, stovnar og onnur, ið skipa fyri ferðum til fuglalendi, hava skyldu at kunna tey ferðandi um frammanfyri standandi reglur.

§ 4. Fuglakanningar, harundir ringmerkingar, kunnu bert fara fram eftir loyvi frá Føroya Náttúrugripasavni og eftir ummæli frá viðkomandi hagastýri.

í staðin fyri:
"frá viðkomandi hagaeigara (hagastýri)"
(Nógva staðni er einbýtishagi)

§ 5. Føroya Náttúrugripa-

savn kann skipa fyri týning av fugli, sum er til ampa á ávísum økjum, sum t.d. alibrúk og floghavn.

Stk. 2. Um ein fuglastovnur er til ampa fyri aðrar stovnar, kann Føroya Náttúrugripasavn skipa fyri, at minkað verður um stovnin um alt landið ella partar av landinum.

Stk. 3. Um ein fuglastovnur er hóttur av skaðadýrum, t.d. rottum og kettum, [illegible] (útløgukattum), kann Føroya Natúrgripasavn skipa fyri týning. ?

Stk. 4. Áðrenn Føroya Náttúrugripasavn ger tiltøk eftir stk. 1, 2 og 3 skal viðkomandi bygdaráð/býráð fáa høvi til at geva sítt ummæli.

2. kapittul.

Um veiðurættindi

§ 6. Uppi á landi eigur grundeigarin veiðurættin. Viðvíkjandi veiðurætti er hann, sum situr við (embætisjørð ella jørð í almennari ogn) javnbjóðis grundeigara.

í staðin fyri:
"Sum situr við kongs- ella aðrari almennari jørð javnbjóðis grundeigara."

Stk. 2. Har ikki serlig rættarviðurskifti gera avvik, hava eigararnir í tí gamla, matrikuleraða bønum í tí bygd, har bjørgini

liggja, fuglaveiðurættin í bjørgum, urðum og tílíkum fuglalendi.

Stk. 3. Har felag er, og samtykt ella fyrndarrættur ger ikki avvik, hava eigararnir javnbjóðis veiðurætt.

Stk. 4. Samtykt um nýtslu av veiðurætti í felag kann gerast á grannastevnu. Í tílíkari samtykt kann fyrisetast, at veiða bert kann fara fram í minni mun ella yvirhøvur ikki.

Stk. 5. Allir eigarar hava atkvøðurætt á grannastevnu um samtykt um veiðu í felag. Til gilduga samtykt krevst vanligur meirluti av bæði markatalinum og eigaratalinum.

Stk. 6. Einsæris burturlating av veiðurættindi kann bert fara fram fyri upp til 5 ár í senn.

Skulu vit droppa stk. 5 ??

Fer hesin setningur ikki at elva til trupulleikar t.d. í Kirkjubø, har meira enn helvtin av markatalinum hoyrir til ein ánara.

§ 7. Rættin til omanfleyg og til at taka hellufugl hevur hvør persónur í tí bygd, sum bjørgini eigur, men eingin uttanbíggja maður.

§ 8. Har ikki serlig rættarviðurskifti gera avvik, hava eigararnir

(hagastýrini) heimild til at áseta samsýning fyri veiðurættindi.
Stk. 2. Slíkar inntøkur verða býttar millum hagarnar eftir markatalinum.

§ 9. Á sjónum út at fiskimarkinum er veiðurætturin við teimum avvikum, sum tilskilað eru í hesi lóg, opnir fyri einum og hvørjum, sum hevur heimarætt.

3. kapittul.
Um veiðutreytir.

§ 10. Tað er bert loyvt at veiða fugl til fólkaføði.
Stk. 2. Veiða má bert fara fram gerandisdagar.
Stk. 3. Føroya Landsstýri ásetir við kunngerð reglur um hagtøl yvir veiðuúrslit.

§ 11. Til fuglaveiðu má byrsa bert nýtast í báti.

§ 12. Til at veiða fugl við byrsu krevst serligt skjótiloyvi.
Stk. 2. Føroya landsstýri ásetir við kunngerð reglur og gjald fyri skjótiloyvi.

§ 13. Ongastaðni er loyvt at skjóta nærri landi enn

200 metrar.

Stk. 2. Við bygd øki má eingin skjóta nærri landi enn 500 metrar.

Stk. 3. Undir lomvigabjørgum (smbr. viðhefta kort) má eingin skjóta nærri enn 4 km úr næsta punkti á landi í tíðini frá 1. februar til og við 31. august og 1 km hvørju megin við.

Stk. 4. Undir ritubergi, lundaurð/-landi, skarvaurð og við æðuvarp má eingin skjóta í sama tíðarskeiði nærri enn 500 metrar.

Stk. 5. Undir súlubjørgum (sí viðhefta kort) má eingin skjóta nærri landi enn 4 km frá 1. februar til og við 31. oktober.

§ 14. Undir frammanfyri nevndu treytum er tað loyvt at veiða hesi fuglasløg og taka ungar/pisur og egg teirra soleiðis:

Havhestur/náti: Havhestur kann fleygast alt árið og skjótast frá 1. ~~august~~ til og við 30. apríl. Loyvt er eisini at ræna og taka ungar.

Skrápur: Lírar kunnu takast við ljósi frá 26. august til og við 5. september á ávísum plássum eftir loyvi frá Føroya Náttúrugripasavni.

Havhestur kann skjótast frá 1.september í staðin fyri frá 1.august. Skal hugsast um fuglin, meðan hann eigur, má veiðitíðin flytast henda mánaðin.

Heldur: "Líri kann takast..."

(Nørrevang tosaði okkurt um hundar)

Súla: Omplar kunnu sláast á ávísum rókum í Mykinesihólmi eftir loyvi frá Føroya Náttúrugripasavni.

Skarvur: Skarvsungar kunnu takast á reiðri á ávísum plássum eftir loyvi frá Føroya Náttúrugripasavni og skjótast frá 1. september til og við 31. oktober.

Likka: Likkuskurar kunnu skjótast frá 1. september til og við 30. apríl. Loyvt er eisini at ræna og taka ungar.

Fiskimási: Másaskurar kunnu skjótast frá 1. september til og við 30. apríl. Loyvt er eisini at taka egg og ungar.

Rita: Rita kann fleygast alt árið og skjótast frá 1. september til og við 30. apríl. Loyvt er eisini at taka egg og ungar.

Lomvigi: Lomvigi kann skjótast frá 1. september til og við 14. mars. Loyvt er at ræna til og við 8. juni í ávísum bjørgum eftir loyvi frá Føroya Náttúrugripasavni.

Lundi: Lundi kann fleygast frá 24. juni til 31. august og skjótast frá 1. september til og við 14. mars. Dráttur kann, undir serligum umstøðum, fara fram

eftir loyvi frá Føroya Náttúrugripasavni, tó bert 3. hvørt ár í sama fuglalendi.

§ 15. Føroya Náttúrugripasavn hevur heimild til í vísindaligum endamáli at geva undantaksloyvi frá §§ 10 til og við 14.

Kapittul 5.

§ 16. Uttan so at harðari revsing er uppiborin eftir lóggávuni annars, kemur hann undir bót, hefti ella fongsul upp í 2 ár, sum brýtur reglurnar í § 3, §§ 6 - 7, §§ 9-11 og §§ 13 og 14.
Stk. 2. Í reglum, ið verða givnar við heimild hesi lóg, kann revsing sum tilskilað í stk. 1 verða ásett.
Stk. 3. Fyri brot á lógina, ið verða gjørd av partafeløgum, lutafeløgum ella líknandi, kann bót verða áløgd felagnum sum slíkum.
Stk. 4. Skjótiloyvið kann verða tikið aftur, um loyvishavarin verður dømdur fyri brot á lógina.

§ 17. Málini fara fram sum politimál. Tey í rættargangslógini kap. 68 (at

leggja hald á) kap. 71 (handtøka) og kap. 72 (fongsling) nevndu tiltøk koma tó eisini í nýtslu í sama mun, sum í málum, sum statsákærin søkir at.

§ 18. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Stk. 2. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu v.m., sum hon er broytt við løgtingslógunum nr. 33 frá 7. juni 1972, nr. 44 frá 24. mai 1974 og nr. 60 frá 5. juni 1984.

Lóg nr.33 frá 16.apríl 1986 skal eisini fara úr gildi.

og 87-lógin!

**FISKIRANNSÓKNARSTOVAN**
**DEBESSARTRØÐ**
**3800 TÓRSHAVN . FØROYAR**
**(FAROE ISLANDS) . TLF. 15092**

21. august 1987.

Nevndin til Endurskoðan av Fuglaveiðulógini
Marni av Kák, sýslumaður
380 Sørvágur

Vísandi til skriv dagf. 28. juli í ár, verður við hesum sent aftur uppskot til løgtingslóg um friðing og veiðu av villini fugli v.m. og nakrar viðmerkingar til okkurt, sum eg eri í iva um.

Biði orsakað seina svarið, sum kemst av, at eg havi verið burturstaddur.

Heilsan
v. Andrias Reinert

Ymsar viðmerkingar v.m. frá Fiskirannsóknarstovuni til lógaruppskotið eru fylgjandi:

Ad § 5, stk. 2 og 3: "Generelt loyvi til at skjóta kráku, ravn, likku, mása og bak".

Ad § 11: "Kráku, ravn og másafuglar á landi? Havhest?"

Ad § 14, Likka: "Bakskurður + Valmási?"

Ad § 14, Lomvigi: "Nær loyvt at fleyga lomviga og álku og skjóta álku á vetri".

Viðmerkingar til uppskotið frá FISKIRANNSÓKNAR-STOVUNI. (Eg havi ført tær inn á eitt skriv dagf. 21. august 1987 frá Fiskirannsóknarstovuni)


FØROYA LANDSSTÝRI

3800 Tórshavn, ⊠ . februar 1987.

Tlf. 1 1080 . Telex 81235 tingns fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10-15, leygardag stongt


F. L. j. nr. ⊠
(at tilskila í svari)

U P P S K O T

SR/EB

| |
|---|
| W: LM86 |
| H: FUGLUR |
| Góðkent |
| Landsst.fund |
| Góðk. til framløgu |

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. ⊠ /1986: Løgtingslóg um friðing og veiðu av villini fugli v.m.

U p p s k o t

til

30 JUNI 87 M

løgtingslóg um friðing og veiðu av villini fugli v.m.

1. kapittul.
Verja av villini fugli.

§ 1. Allur fuglur, ið ikki er nevndur í § 14 er friðaður allastaðni út at tí fiskimarkinum.
Stk. 2. Friðingin umfatar eisini egg, pisur (ungar) og reiður.

§ 2. Tað er forboðið at flyta inn og út av landinum allan livandi og deyðan fugl. Hetta forboðið umfatar eisini egg, pisur (ungar), reiður og lutir av fugli (t.d. eggjakoppar og

ham (skinn).
Stk. 2. Føroya Náattúrugripasavn kann í serligum førum og við vísindaligum endamáli gera undantak frá stk. 1.

§ 3. Tað er forboðið at órógva fuglin við óneyðugum óljóði frá skipum, bátum, skjóting, skipsfloytum, flogførum/ tyrlum ella øðrum gangi.
Stk. 2. Tað er forboðið ørindaleysum at órógva fuglin, har hann heldur til ella reiðrast.
Stk. 3. Tað er forboðið at avmynda (fotografera-filmataka upp á video) sjáldsom fuglasløg nærhendis og á reiðrum teirra, t.d. lóm, smyril og vípu.
Stk. 4. Ferðamannafeløg, stovnar og onnur, ið skipa fyri ferðum til fuglalendi, hava skyldu at kunna tey ferðandi um frammanfyri standandi reglur.

§ 4. Fuglakanningar, harundir ringmerkingar, kunnu bert fara fram eftir loyvi frá Føroya Náttúrugripasavni og eftir ummæli frá viðkomandi hagastýri.

§ 5. Føroya Náttúrugripa-

savn kann skipa fyri týning av fugli, sum er til ampa á ávísum økjum, sum t.d. alibrúk og floghavn.

Stk. 2. Um ein fuglastovnur er til ampa fyri aðrar stovnar, kann Føroya Náttúrugripasavn skipa fyri, at minkað verður um stovnin um alt landið ella partar av landinum.

Stk. 3. Um ein fuglastovnur er hóttur av skaðadýrum, t.d. rottum og kettum (útløgukattum), kann Føroya Natúrgripasavn skipa fyri týning.

Generelt loyvi at skjóta kráku ravn likka másu og bak.

Stk. 4. Áðrenn Føroya Náttúrugripasavn ger tiltøk eftir stk. 1, 2 og 3 skal viðkomandi bygdaráð/býráð fáa høvi til at geva sítt ummæli.

2. kapittul.

Um veiðurættindi

§ 6. Uppi á landi eigur grundeigarin veiðurættin. Viðvíkjandi veiðurætti er hann, sum situr við embætisjørð ella jørð í almennari ogn javnbjóðis grundeigara.

Stk. 2. Har ikki serlig rættarviðurskifti gera avvik, hava eigararnir í tí gamla, matrikuleraða bønum í tí bygd, har bjørgini

liggja, fuglaveiðurættin í bjørgum, urðum og tílíkum fuglalendi.

Stk. 3. Har felag er, og samtykt ella fyrndarrættur ger ikki avvik, hava eigararnir javnbjóðis veiðurætt.

Stk. 4. Samtykt um nýtslu av veiðurætti í felag kann gerast á grannastevnu. Í tílíkari samtykt kann fyrisetast, at veiða bert kann fara fram í minni mun ella yvirhøvur ikki.

Stk. 5. Allir eigarar hava atkvøðurætt á grannastevnu um samtykt um veiðu í felag. Til gilduga samtykt krevst vanligur meirluti av bæði markatalinum og eigaratalinum.

Stk. 6. Einsæris burturlating av veiðurættindi kann bert fara fram fyri upp til 5 ár í senn.

§ 7. Rættin til omanfleyg og til at taka hellufugl hevur hvør persónur í tí bygd, sum bjørgini eigur, men eingin uttanbíggja maður.

§ 8. Har ikki serlig rættarviðurskifti gera avvik, hava eigararnir

(hagastýrini) heimild til at áseta samsýning fyri veiðurættindi.
Stk. 2. Slíkar inntøkur verða býttar millum hagarnar eftir markatalinum.

§ 9. Á sjónum út at fiskimarkinum er veiðurætturin við teimum avvikum, sum tilskilað eru í hesi lóg, opnir fyri einum og hvørjum, sum hevur heimarætt.

3. kapittul.
Um veiðutreytir.

§ 10. Tað er bert loyvt at veiða fugl til fólkaføði.
Stk. 2. Veiða má bert fara fram gerandisdagar.
Stk. 3. Føroya Landsstýri ásetir við kunngerð reglur um hagtøl yvir veiðuúrslit.

§ 11. Til fuglaveiðu má byrsa bert nýtast í báti.

Kráku navn og másafuglar á landi?
havhest?

§ 12. Til at veiða fugl við byrsu krevst serligt skjótiloyvi.
Stk. 2. Føroya landsstýri ásetir við kunngerð reglur og gjald fyri skjótiloyvi.

§ 13. Ongastaðni er loyvt at skjóta nærri landi enn

200 metrar.
Stk. 2. Við bygd øki má eingin skjóta nærri landi enn 500 metrar.
Stk. 3. Undir lomvigabjørgum (smbr. viðhefta kort) má eingin skjóta nærri enn 4 km úr næsta punkti á landi í tíðini frá 1. februar til og við 31. august og 1 km hvørju megin við.
Stk. 4. Undir ritubergi, lundaurð/-landi, skarvaurð og við æðuvarp má eingin skjóta í sama tíðarskeiði nærri enn 500 metrar.
Stk. 5. Undir súlubjørgum (sí viðhefta kort) má eingin skjóta nærri landi enn 4 km frá 1. februar til og við 31. oktober.

§ 14. Undir frammanfyri nevndu treytum er tað loyvt at veiða hesi fuglasløg og taka ungar/pisur og egg teirra soleiðis:
Havhestur/náti: Havhestur kann fleygast alt árið og skjótast frá 1. august til og við 30. apríl. Loyvt er eisini at ræna og taka ungar.
Skrápur: Lírar kunnu takast við ljósi frá 26. august til og við 5. september á ávísum plássum eftir loyvi frá Føroya Náttúrugripasavni.

Súla: Omplar kunnu sláast á ávísum rókum í Mykinesihólmi eftir loyvi frá Føroya Náttúrugripasavni.
Skarvur: Skarvsungar kunnu takast á reiðri á ávísum plássum eftir loyvi frá Føroya Náttúrugripasavni og skjótast frá 1. september til og við 31. oktober.
Likka: Likkuskurar kunnu skjótast frá 1. september til og við 30. apríl. Loyvt er eisini at ræna og taka ungar.

Balskurður + Valmási ?

Fiskimási: Másaskurar kunnu skjótast frá 1. september til og við 30. apríl. Loyvt er eisini at taka egg og ungar.
Rita: Rita kann fleygast alt árið og skjótast frá 1. september til og við 30. apríl. Loyvt er eisini at taka egg og ungar.
Lomvigi: Lomvigi kann skjótast frá 1. september til og við 14. mars. Loyvt er at ræna til og við 8. juni í ávísum bjørgum eftir loyvi frá Føroya Náttúrugripasavni.

Nar loyvt at fleyga lomviga og álku og skjóta álku á vetri

Lundi: Lundi kann fleygast frá 24. juni til 31. august og skjótast frá 1. september til og við 14. mars. Dráttur kann, undir serligum umstøðum, fara fram

eftir loyvi frá Føroya Náttúrugripasavni, tó bert 3. hvørt ár í sama fuglalendi.

§ 15. Føroya Náttúrugripasavn hevur heimild til í vísindaligum endamáli at geva undantaksloyvi frá §§ 10 til og við 14.

Kapittul 5.

§ 16. Uttan so at harðari revsing er uppiborin eftir lóggávuni annars, kemur hann undir bót, hefti ella fongsul upp í 2 ár, sum brýtur reglurnar í § 3, §§ 6 - 7, §§ 9-11 og §§ 13 og 14.

Stk. 2. Í reglum, ið verða givnar við heimild hesi lóg, kann revsing sum tilskilað í stk. 1 verða ásett.

Stk. 3. Fyri brot á lógina, ið verða gjørd av partafeløgum, lutafeløgum ella líknandi, kann bót verða áløgd felagnum sum slíkum.

Stk. 4. Skjótiloyvið kann verða tikið aftur, um loyvishavarin verður dømdur fyri brot á lógina.

§ 17. Málini fara fram sum politimál. Tey í rættargangslógini kap. 68 (at

leggja hald á) kap. 71 (handtøka) og kap. 72 (fongsling) nevndu tiltøk koma tó eisini í nýtslu í sama mun, sum í málum, sum statsákærin søkir at.

<u>§ 18.</u> Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
<u>Stk. 2.</u> Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu v.m., sum hon er broytt við løgtingslógunum nr. 33 frá 7. juni 1972, nr. 44 frá 24. mai 1974 og nr. 60 frá 5. juni 1984.

POLITISTØÐIN
J. Broncksgøta - 3800 Tórshavn
Tlf. 11448

Journ. nr.

HjS/eh

Tórshavn, tann 12. august 1987.

NEVNDIN TIL ENDURSKOÐAN
AV FUGLAVEIÐULOGINI
Marni av Kák, sýslumaður
FR 380 Sørvági

Vegna viðmerkingar til uppskot til "Løgtingslóg um friðing av villini fugli v.m.".

<u>3. kapittul, grein 14</u>: <u>Lomvigi</u>: Her vildi eg skotið upp frá 01. mars, men eri eg væl vitandi um, at hettar er órealistiskt og ikki kemur ígjøgnum á tingi.

Viðvíkjandi somu grein um ræning eftir lomvigareggum, vil eg mæla til, at hesi loyvi bert verða givin 5. hvørt ár, ella als ikki. Hettar sagt út frá tí erfaring eg havi fingið við at tosa við "byrsumenn", sum ikki fáast at skilja ella ikki vilja skilja, at allur fuglur, og harvið lomvigin, verpur aftur.

Her er mótstøðan so hørð, at eg meti tað sum klókast at fylgja hesum ráðum, um friðingin skal lukkast til fulnar.

Annars havi eg ikki fleiri viðmerkingar hesum viðvíkjandi.

Kortini má eg aftur nevna hettar, sum eg fyrr havi tosað við jóhan Ziskason um, og sum eg havi sent 2 brøv við uppskotum um til løgtingið, at Vaktar- og Bjargingartænastan fær myndugleika til at ákæra - taka - og konfiskera, tá ið fram verður komið á fólk, sum skjóta ólógliga, hvar tað so enn er.

Ziskason er sera positivur hesum viðvíkjandi, at menn sum veiða - ella ætla at veiða ólógliga - vita, at "Spógvin" ella annað skip hevur henda myndugleika. Um

FR:6

tit megna at fáa hettar við, so verður lógin nógv betur, og verður heilsað vælkomin av mær og mongum øðrum.

Eg havi einaferð tosað við juristar í landsstýrinum, og meta teir, at henda myndugleika kunnu teir fáa við, um ikki beinleiðis í friðingarlógina.

MÓTTIKIÐ
1 - AUG. 1967
Vága Sýsla

Hjartvard Skálagarð

**FØROYA JARÐARRÁÐ** F.J.j.nr. 1987/178

*3800 Tórshavn, tann* 1. september 1987

Nevndin til endurskoðan av fuglaveiðulógini
Marni av Kák, sýslumaður
380 Sørvági

Viðv. endurskoðan av fuglaveiðulógini:

Orsakað av feriu o.ø. var lítið skotbrá at viðgera uppskotið og ummæla tað.

Uppskotið varð umrøtt á fundi 26. august 1987, og var ráðið samt um at grein 11 eigur at broytast soleiðis, at tað eisini er loyvt at veiða fugl við byrsu á landi.

Nevnast kann, at tað ikki er óvanligt at menn skjóta havhest og másа á landi, uttan at henda skjóting nervar bjargafugl.

J.v.

[signature]

UPPSKOT TIL BROYTINGAR, OG VIÐMERKINGAR FRÁ FØROYA FUGLA-FRØÐISFELAG TIL FUGLAVEIÐILÓGINA.

<u>1 kapittul.</u>
Grein 2 strikast.
Nýtt uppskot:
Tað er forboðið at innflyta livandi fugl til Føroya, t.d. Fasanir, Gæs og Dúgvur.
Dúgvur ið verða aldar, skulu verða innistikaðar.

Viðmerking til grein 2:
Úr øllum dúvugørðum í landinum eru Dúgvur útilagstar, og verða blandaðar við Bládúgvuna.Hetta ger, at føroyska Bládúgvan so líðandi missir síni sereyðkenni, um ikki okkurt álvarsamt verður gjørt í bræði.Annars skal verða bannað at flyta Brævdúgvur til landið.Tær hava eisini somu avleiðingar fyri Bládúgvuna.

<u>3 kapittul.</u>
Grein 1o.
Uppskot til broyting:
Undantikið t.d. Ravn og Kráku.

Grein 11 strikast.
Viðmerking til grein 11:
Nógvur Mási og Náti verður skotin frá landi.Øll hava ikki bát.
Og vit halda, at tað er burturvið, ikki at kunna veiða frá landi.

Grein 13 strikast.
Viðmerking til grein 13:
Somu viðmerking sum til grein 11.
Uppískoyti til grein 13:
Til fuglaveiðu verður bara brúkt hóglbyrsa við 2 skotum, og størsta kaliber skal verða kaliber 12.

Uppískoyti og broytingar til grein 14.
Tað er loyvt at skjóta Súlu og Skarv frá 1 okt. til og við 31 januar.

Viðmerkingar:
Í tí tíðarskeiðinum er nógv útlendsk Súla og Skarvur við Føroyar.

Broytingar til grein 14:
Likka, Fiskimási, Svartbakur, Valmási og Skatumási kunnu skjótast frá 1 sep. til og við 3o apríl. Loyvt er eisini at ræna egg við loyvi frá Føroya Náttúrugripasavni.

Broytingar til grein 14:
Loyvt er at skjóta Kráku og Ravn frá 1 sep. til og við 3o apríl.

Viðmerkingar:
Av øllum hesum fuglasløgunum hava vit eina kunstiga yvirskipan av, t.d. føða fiskiskip, flakavirki og avlop frá fólki øll hesi fuglasløg, og eru beinleiðis ella óbeinleiðis ein hóttan ímóti heiðafugli, og øðrum fugli ið ikki hevur tann fyrimunin. So tað ger einki, um tað verður minka eitt sindur um hann uttan fyri bútíðina.

Føroya Fuglafrøðisfelag heldur, at eitt tað mest týdningarmiklasta við hesi lóg er, at Lomvigin, sum er minkaður við 8o % seinastu 25 árini, fær allan tann frið, vit kunnu geva honum. Og at vit fylgja altjóða lóg, sum bannar allari skjóting um summari.

Nevndarinnar vegna (undantikin B. Olsen)
Erik Mortensen
Kassameistari

N.B. Haru og Kópaveiða er ikki nevnd?

JENS - KJELD Jensen
3827 Nólsoy
Føroyar (Faroe Islands)

Tlf. 27064

Nólsoy, tann. 17.08.87

Til
NEVNDINA TIL ENDURSKOÐAN AV FUGLAVEIÐILÓGINI.

Da § 2 i kapitel 1, vil få katastrofal indvirkning på mit erhverv, og efter samtale med Bergur Olsen, tillader jeg mig herved at skrive til Dem.

I kapitel 1, § 2, står der helt konkret: At f.eks. en turist ikke må tage en udstoppet lunde med hjem. At en færing, som har fundet en stær, og vil forære den til sin familie i Danmark, heller ikke må det. At en færøsk fiskebåd ved Flemmingskap, som får en lille fugl ombord, og den så dør, heller ikke må tage den med hjem til Færøerne. Hvis jeg mangler en gråand til en færøsk kunde, kunne jeg f.eks. tænke mig at sende et lundeskind til Danmark i bytte med et gråandeskind, det ville også være ulovligt.

Efter samtalen med Bergur Olsen, fik jeg at vide, at ovennævnte ikke var hensigten med den nye lov. Derfor vil jeg hermed bede om at § 2 helt bliver forandret. I kapitel 1 § 1 og § 3 samt kapitel 2 § 6, er alle vilde fugle, reder, æg og unger fredet, så på det område skulle § 2 kapitel 1 være overflødig.

Men i § 2 kapitel 1, kunne der stå: Al indførelse af levende fugle, som kan udgøre en fare for faunaforfalskning, f.eks. Rype, Fasan og Brevduer er forbudt.

1. kapitel § 2 stk. 2.

Nu da jagtloven gælder ud til 2oo sømil, er mange meget almindelige fugle blevet fredet, som jeg normalt har i min forretning.Her tænker jeg på f.eks. Sodfarvet skråpe og Sule, som er meget talrige.I sådanne tilfælde, synes jeg ikke det kunne gøre noget, at Føroya Náttúrugripasavn kunne give tilladelse til at jeg kunne tage nogle til udstopning.

Så stk. 2 kunne lyde således:

Føroya Náttúrugripasavn kan give tilladelse til jagt eller fangst på ikke truede fuglearter, både til videnskabelig og erhvervsmæssig brug.

Jeg håber, at I vil se med velvilje på overnævnte, da jeg ellers kan blive nødt til at lukke min forretning.

Venligst

Arne Nørrevang
Tórsbyrgi 13
100 Tórshavn

20. august 1987

Nevndin til endurskoðan av fuglaveiðilógini
v/ Marna av Kák, syslumaður
380 Sørvág

Við hesum sendi eg nakrar viðmerkingar til uppskotið til nyggja fuglaveiðilóg.
Eg eri harmur um, at nógv arbeiði hevur seinkað hesar viðmerkingar.

Vinarliga

Arne Nørrevang

Arne Nørrevang

Arne Nørrevang
Tórsbyrgi 13
100 Tórshavn

20. august 1987

Viðmerkingar til uppskot um friðingar- og veiðulóg.

Eg eri fegin um at verða biðin um viðmerkingar.
Eg haldi uppskotið er frálikt í sini heild, serstakliga fegnist eg um "andan" í uppskotinum.
Eg havi bert fáar og litið týðandi viðmerkingar.

Í lógini eiga at verða reglur fyri haldi av fuglum, eitt nú skurum, pisum, ravnum, krákum o.t.

par.2. Eigur ikki at verða skoytt uppí "friðaðan", so at loyvt er at senda t.d. frystar lundar til Danmarkar?

par.3 eigur ikki her at standa "bjarga"-fuglin, tí í stk.2 eru reglur fyri annan fugl?

stk.3. Hvør ásetur hvørji fuglasløg eru sjáldsynd? Eisini má standa at undantaksloyvi kann gevast.

par.4. Fuglakanningar kunnu eisini vera eygleiðingar, og tað eigur at vera loyvt at eygleiða við tí treyt, at hetta ikke er til ampa fyri ella órógvar fuglin.

par.5. her kundu eisini ruskstøðir verið nevndar.

par.6 stk2. Her kundi staðið "í tí bygd, har fuglabjørg liggja"
Eftir minum tykki er tað kanska ein spurningur, um rættindi og eigaraviðurskifti eiga at verða viðgjørd so gjølla í hesi lóg.
par. 9. kundi verið flutt til at verða par. 6.stk 7.

par.7. Ein spurningur er um omanfleyg skal vera loyvt yvurhøvur.

par.11. Er ætlanin, at tað ikki skal vera loyvt at skjóta á og frá landi, eitt nú skurar og havhestar?

par.12. Eftir minum tykki átti par,16.stk.4 at verið sett sum par.12,stk.3.

par.13. Ongastaðni er loyvt at skjóta <u>á sjónum</u> nærri enn...
Kanska skuldið veriðhugsað um at seta mark á landi eisini.

stk.2. Hvussu er definisjónin fyri "bygd øki"? Og hvør skal gera eina sovorðna?

stk.4. Til síðurnar?

stk.5. Til síðurnar?

par.14. Viðvíkjandi lírum eigur ikki at verða ásett, at teir kunnu takast við ljósi, t.d. eru manngjørdar holur ymsastaðni. Afturfyri kundi nevnt verið, at ikki er loyvt at taka líra við hundi.
Ikki heldur haldi eg, at neyðugt er við loyvi frá FN.
Súluomplar kunnu "takast", sí t.d. orðingina fyri skarvi.

dýraverndi?

Afturfyri haldi eg serstøk reglugerð skuldi verið fyri drápshættir yvirhøvur.
Ikki er neyðugt við loyvi frá FN til at taka skarvsungar. Ei heldur eigur at standa at bert skarvsungar kunnu skjótast, tí ringt kann vera at skilja millum gamlan og ungan skarv.

Í lógini eigur at verða reglur fyri haldi av fuglum, eitt nú skurum, pisum, ravnum, krákum o.t.

Vinarliga

Arne Nørrevang

Arne Nørrevang

Føroya óðalsfelag
Hornavegur 16
188 Hoyvík

Hoyvík, tann 19. august 1987

Nevndin til endurskoðan av fuglaveiðulógini
v/Marna av Kák, sýslumanni
380 Sørvági

Føroya óðalsfelag hevur fingið til ummælis uppskot til eina nýggja løgtingslóg um friðing og veiðu av villini fugli v.m.

Stýrislimir okkara og limir okkara í Mykinesi og Viðareiði hava fingið uppskotið til viðgerðar. Hjálagt verður sent tað álit, sum komið er av Viðareiði, har fundur við 25-30 luttakarum hevur verið um málið.

Yvirhøvur er at viðmerkja, at hildið verður, at uppskotið er eitt valaverk, og at framstigini í mun til galdandi veiðulóg eru stór. Viðmerkingarnar kunnu helst samanfatast soleiðis:

Viðareiðismenn gera vart við, at orðingin í § 2 jú ber við sær, at tað er forboðið at handla við útstappaðum lundum, og at ein fuglur sum høsnarungi kemur undir orðingina.

Án § 5 halda viðareiðismenn, at sýslumaðurin og ikki náttúrugripasavnið (stk. 1) skal standa fyri týning á ávísum støðum. Viðvíkjandi stk. 2 halda teir, at ein grannnastevna skal gera av, um minkast skal, og í 3. stk. halda teir, at neyðugt er, at bygdaráðið er við, saman við náttúrugripasavninum, til at skipa fyri týning av skaðadýrum.

Hesi grein viðvíkjandi metir ein av okkara stjórnarlimum, at vit í stk. 2 skulu seta orðini "í samráð við staðkent fólk" eftir F.N., og at vit í 3. stk. skulu nýta orðið "skal" í staðin fyri "kann".

Sami limur hevur ta áskoðan til § 12, at hon skal herðast, so at lagt verður afturat í 1. stk. "sum verður at hava uppi á sær tá veitt verður", meðan viðareiðismenn halda, at §§ 11 og 12 skulu strikast.

Viðareiðismenn hava eitt broytingaruppskot til §13, sum tað verður víst til.

Viðvíkjandi § 14 eru ymsar viðmerkingar. Hildið verður, at tað er løgið at tað skal vera loyvt at skjóta havhest meðan hann hevur unga, og tað er so ikki fyrr enn í seinnu helvt av august at nátin fer úr reiðrinum. Tí er kanska betri at seta 25.8. í staðin fyri 1.8.

Um skráp halda viðareiðismenn, at lírar eisini skulu kunna dragast, og at tað ikki skal vera neyðugt at søkja FN um loyvi til hetta.

Hildið verður, at tað er løgið at seta í lógina, at mykinesmenn skulu søkja FN um loyvi til at sláa omplar. Tað skuldi verið óneyðugt, tá hugsað verður um, at teir í øldir hava røkt súluna við virðing og hegni. Her hevði verið meir orsøk til at sagt, at

FN skal kunna koma við einum grundaðu forboði minst ein mánað áðrenn, um so er at orsøk er til at halda at stovnurin er í vanda.

Viðareiðismenn halda at tað er ov tíðliga at skjóta lomviga/álku fyri 1. februar. Hin vegin halda teir, at loyvt skal vera at fleyga hendan fugl frá 1. juni til 31. august.

Viðvíkjandi lundanum halda teir, at eingin orsøk er til at seta nakra ávísa fleygingatíð í lógina, og teir siga einki um drátt. Men úr Mykinesi verður sett ynski fram um, at tað verður sett forboð móti at taka lundapisu. Sum er, verða í Mykinesi tiknar fleiri túsund pisur úr einum umráði, har teir fyrr bert drógu 1200 lundar, tí pisan kemur inn í bygdina nú ljós er har um náttina. Fremmandafólk í hópatali kemur út í oynna at fáa sær pisu undir tonnina. Harumframt átti tað at staðið í lógini, at sildberin var friðaður. Hetta er ein normur, sum altíð hevur verið galdandi, men ikki hevði tað verið verri, um hann stóð í lógini. Viðvíkjandi drátri verður sagt úr Mykinesi, at tað átti at vera so, at FN varð álagt at skipa fyri drátri har tað er vallað. Sum er kemur so nógvur búfuglur hesi støð, at allar torvur verða grivnar burtur, og er tað eingin sum hevur eyguni eftir, at drigið verður, so er skjótt einki av valling eftir. Rímiligt er, at FN, sum eftir hesum uppskoti fær so nógva heimildir, eisini fær eina skyldu sum hesa.

Ein mykinesmaður heldur, at tyrluflúgvingin fer alt ov illa við fuglastovninum. Hon flýgur beint fram við har nógvur fuglur eigur, og verður hann tí órógvaður ofta fleiri ferðnar um dagin. Hann heldur onga orsøk vera til at flúgv um summarið yvirhøvur, og skjýtur tí upp, at forboð skal setast móti flúgving í fuglatíðini, serliga í fleygingartíðini, men sjálvandi soleiðis, at undantaksloyvi skal kunna gevast um serligar orsøkir eru til tess.

Um so er, at nevndin ynskir fund við okkum, eru vit sjálvandi til reiðar til tað.

Við bestu heilsum

Zakarias Wang

Óðalsfelagið
v/ Zakarias Wang
Hornaveg 16,
FR 188 Hoyvík

Viðareiði hin 16.8.1987

Jógvan Absalonsen á Viðareiði fekk herfyri sendandi uppskot til "Løgtingslóg um friðing og veiði av villini fugli v.m." Hann læt hetta víðari til Nils J. Absalonsen, sum saman við øðrum fekk fund í lag til at viðgera og ummæla uppskotið. Til fundin, ið varð hildin í nýggja skúla á Viðareiði 8.8.1987, vóru møttir einir 25-30 mans.

Fundurin tók í høvuðsheitum undir við uppskotinum - við teimum broytingum, ið niðanfyri standa. Vald var ein fimmmannanevnd til at orða okkara uppskot.

Broytingarnar eru hesar:

§ 2. eigur at vera strikað.

Viðm.: Kemur henda grein í gildi, hevur tað við sær, at tað t.d. ikki verður loyvt at flyta ein útstappaðan lunda av landinum ella at innflyta ein høsnarunga til matnað.

§ 5. verður soljóðandi:

stk. 1. Sýslumaðurin kann geva loyvi til týning av fugli, ið er til ampa á ávísum økjum, sum t.d. alibrúk og floghavn.

stk. 2. Um ein fuglastovnur er til ampa fyri aðrar stovnar, kann grannastevna gera av, um minkast skal um stovnin.

stk. 3. Um ein fuglastovnur í ávísum fuglalandi er hóttur av skaðadýrum, t.d. rottum og kettum (útløgukattum), skal Føroya Náttúrugripasavn saman við bygdarráðnum skipa fyri týning.

Viðm. til § 5.:

stk.1. Orsøkin til at sýslumaðurin verður nevndur einsamallur, er, at gongdin gerst alt ov drúgv og trupul, um farast skal til fleiri stovnar at biðja um loyvi.

stk. 2. At fuglastovnurin í einum ávísum lendi (bergi ella urð) er hóttur av øðrum fuglastovni, merkir ikki altíð, at fuglastovnurin sum heild er hóttur. Hesin truppulleiki er so mikið staðbundin, at tað er skilabest, at lokalur myndugleiki skipar fyri minking av tí hóttandi fuglaslagnum.

stk. 3. Bygdarráðið skal sjálvandi takast við, tí tað er valla hugsandi, at Føroya Náttúrugripasavn av sínum eintingum fer at skipa fyri nakrari týning, tíansheldur bera kostnaðin av hesum.

§ 11. verður at strika.

§ 12. verður somuleiðis at strika.

§ 13. stk. 1 og stk. 2 verða strikað.

Okkara uppskot til § 13:

stk. 1. Undir lomvigabjørgum má eingin skjóta nærri enn 3 fjórðingar úr næsta punkti á landi frá 1. februar til og við 31. august.

stk. 2. Undir ritubergi, lundaurð/-landi, skarvaurð og við æðuvarp má eingin skjóta nærri enn 1 fjórðing.

stk. 3. Tað sama sum stk. 5 í uppskotinum.

§ 14.

Skrápur: Lírar kunnu dragast ella takast við ljósi.

Lomvigi/álka: Kunnu skjótast frá 1. september til 1. februar og fleygast frá 1. juni til 31. august.

Lundi: Kann fleygast. Hann kann skjótast í tíðini 1. september til og við 14. mars.

Súla: Omplar kunnu sláast í ávísum rókum í Mykineshólmi.

Hara: Loyvt er at skjóta haru frá 3. november til og við 31. desember.

Ravnur, kráka, skúgvur og kjógvi kunnu skjótast alt árið.

Viðm. til § 14.:

Lomvigi/álka: Sum kunnugt kemur búfuglurin at landi longu á pálsmessu (25. januar). Smbr. kanningum er tað serliga búfuglurin, ið verður skotin teir fyrru mánaðirnar av árinum (sí "Sjómaðurin" nr. 2 1971). Tí halda vit , at skjótitíðin eigur at vera úti 1. februar.
Viðv. fleygini er tað at siga, at vit ikki meta henda veiðihátt sum serliga hóttan móti stovninum. Harafturat er hetta ein mentanarligur spurningur. Lomvigafleyg er ein týðandi táttur í okkara bjargasøgu og -mentan. Verður friðingin longd í nógv ár afturat, er vandi fyri, at tann parturin av okkara siðaarvi, sum lomvigafleygingin er, dettur niðurfyri með alla.

Lundi: Lundatíðin avmarkar seg sjálv. Her norðuri er vanligt at fleyga lunda frá hálvum juni til stutt eftir ólavssøku - so leingi sum nakað er fáa. Tí halda vit tað ikki vera neyðugt at áseta eitt ávíst tíðarskeið til at fleyga lunda.

§ 16.

stk. 4. fellur burtur av sær sjálvum.

Við nevndu broytingaruppskotum og viðmekingum
verður hetta sent

Vinaliga
vegna fundin 8.8.1987

Andrias Justesen
Nils J. Absalonsen

Tummas Thomasen
[illegible]
Jacob M Jacobsen